LM-011/2025

Heilsumálaráðið 3.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Tórshavn tann 09.07.2025

Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um sterilisatión og kastratión

Fyrst skal nevnast at kastratión og sterilisatión eru 2 heilt ymisk ting. Tey áttu als ikki at verið nevnd í sama lógaruppskotið. Eg fari at skjóta upp, at tað verða gjørd tvey lógaruppskot, hvar í annað handlar bert um sterilisatión og hitt handlar bert um kastratión.

Viðmerkingar til lógaruppskot um sterilisatión:

Í staðin fyri at áseta eina umhugsunartíð uppá 6 mánaðar, um persónar ímillum 25 og 30 ár kunnu steriliserast, kundi ein broytt aldursmarkið, sostatt at sterilisatión, uttan loyvi, kann veitast øllum borgarum, sum eru omanfyri 30 ár, men at allir borgarar, sum eru undir hetta skulu søkja um loyvi til hesa viðgerð.

Annars samdur í øllum hinum viðmerkingum um nær sterilisatión skal gerast og loyvast.

Viðvíkjandi tað at fremja sterilisatión, so eigur hetta at gerast á einum sjúkrahúsið, av serlækna í urologi.

Eisini skal gevast møguleiki fyri, at hetta inntriv kann fremjast í privat praksis.

Orsøkin til hetta er, at sterilisatión í flestu av okkara grannalondum er eitt inntriv, ið ikki fer fram í offentlig regi. Sterilisatión krevur operatiónskapacitet. Um hetta verður gjørt á offentligum sjúkrahúsum, fer hetta at taka pláss hjá øðrum álvarsomum somatiskum sjúkum. Eg fari at tilmæla, at møguleiki gerst at serlækni í urologi kann fremja hetta ítriv eisini í privat regi. Hetta fer at spara almennu sjúkrahúsunum operatiónskapasitet og eisini økonomi.

Viðmerkingar til kastratión:

Sum kunnugt er kastratión eitt heilt annad inntriv enn sterilisatión og eigur als ikki at verða nevnt í sama sambandi sum sterilisatión. Tad merkir burturtøka av testiklunum hjá monnum og burturtøka av eggjastokkunum hjá kvinnum. Hetta kann gerast antin sum ein skurðviðgerð ella kann eisini fremjast við medisinskari viðgerð.

Kastratión hjá kvinnum:

Hetta kann vera ein terapeutisk kastratión, ið verður brúkt í samband við undirlívssjúku t.d. endometriosu og øðrum. Kastratión kann eisini verða framd í samband við krabbameinsskurðviðgerðir og aðrar sjúkur í eggjastokkum.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo

Kastratión hjá monnum:

Kastratión hjá monnum verður ofta deild upp í kastratión hjá yngri monnum og hjá eldri monnum.

Kastratión hjá yngri monnum:

1. Hetta kann gerast í samband við t.d. trans gender viðgerð, hvar menn ynskja kynsskifti frá mann til kvinnu.
2. Hetta kann eisini gerast í samband við ymisk sløg av vakstrarólagi hjá dreingum.
3. Hetta kann gerast um menn eru sexual brotsmenn fyri at minka um libido.

Kastratión hjá eldri monnum:

Hetta verður ofta gjørt sum ein kastratión í samband við viðgerð av krabbamein. T.d. er medisinsk og kirurgisk kastratión ein tann mest vanliga viðgerð hjá sjúklingum, ið hava dissemineraðan prostatakrabba. Hetta er eitt sera vanligt og væl evidens basera inntriv.

Kastratión hjá sjúklingum, ið hava krabba í testiklum:

Ca. 6-7% av øllum monnum, ið fáa krabba í testis hava bilaterala sjúku og í hesum førum kann kirurgisk kastratión verða neyðug.

Kastratión í samband við medisinskar sjúkur:

Tað finnast ymiskar sjúkur, í t.d hypofysuni, sum gera at menn blíva kastreraðir. Eisini finnast ymiskar medisinskar sjúkur í sjálvum testiklum, sum ger at menn blíva kastreraðir.

Hjáárin til ymiskar medisinskar viðgerðir:

Tað finnast fleiri sløg av medisinskum viðgerðum, sum elva til medisinska kastratión. Eitt nú um menn hava verið í viðgerð við androgen/testosteron í langa tíð, í samband við t.d. body-building, so tá ið teir gevast við hesi viðgerð, verða teir ofta infacto kastreraðir. Hetta vegna tað at testis funktiónin hevur verið supprimera í langa tíð og kemur ongantíð aftur fyri seg.

Eisini eru ymisk sløg av medisin, í samband við viðgerð fyri benigna prostata hyperplasi, sum elva til defacto medisinska kastratión eftir langa tíð.

Kirurgisk versus medisinsk kastratión:

Kirurgisk kastratión er eitt inntriv, hvar testiklarnar verða tiknir burtur, skornir vekk í generallari anæstesi. Tað kann gerast við omanfyri nevndu indikatiónum. Hetta er eitt inntriv, ið skal fremjast av serlækna í urologi.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Hjá kvinnum kann kastratión (oophorectomi) gerast laparoskopiskt, og eru hesi inntriv eisini framd av serlækna í gynækologi/obstetrik.

Medisinsk kastratión:

Medisinsk kastratión kann fremjast á ymiskan hátt:

1. LHRH agonistar – hetta er tann mest vanligi viðgerðarháttur. Givið verður ein superstimulans av hypofysuni, sum ger at FSH/LH tømist og tí hvørvur hypofysera stimulatónin av testiklunum. Hetta elvir so til at maður ella kvinna, blíva kastreraði eftir ca. 14 døgnum.

2. FSH/LH antagonistar - Hetta er eisini ein sera vanligur háttur at kastrera bæði menn og kvinnur uppá. Brúkt verður mest eitt stoff, ið kallast **Degarelix sum** effektivt blokerar virkningin av LH releasing hormon og harvið blokerar FSH/LH, sum so elvir til at fremleiðslan av mannligum og kvinnuligum kynshormonum frá gonadunum steðgar.

3. Viðgerð við yvirdosis av østrogen - Viðgerð við supranormalum dosum av østrogen verður ofta brúkt sum medisinsk kastratión hjá mannfólki. Hetta elvur til at hypofysan steðgar við at gera LH/FSH og harvið steðgar framleiðslan av testosteron.

4. Viðgerð við supranormalari dosis av testosteron – henda viðgerð er ofta sera populer ímillum body-buildarar, ið misnýta anabolskar steroidur. Tá teir hava tikið supranormalar dosir av androgenum í eina tíð, so tódna testiklarnar, blíva innaktivir og tá ið teir so gevast við at taka anaboliskar steroidir eru mennirnir defacto kastreraðir.

Hetta var í skundi, nakrir heilt fáir kommentarir til lóg um sterilisatión og kastratión.

Eg haldi at uppskoti er alt ov illa gjøgnumarbeitt, hvat einum fagligum medisinskum vinkli viðvíkur.

Eg haldi at ein átti at fingið serlækna í Psykiatri , endokrinologi, gynækologi/obstetrik og urologi, at lisið og reviderað uppskotið, soleiðis at hetta passar til nútíðar medisinskan kunnleika.

Vinaliga

Jóhan Poulsen

Serlækni í urologi